Tryggingareftirlitið

Til tryggingarfeløg og eftirlønargrunnar, grannskoðarar og ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingar

**Tórshavn 23. desember 2025**
Journalnr.: 25/00534-2

**Jólabræv 2025**

Við hesum vil Tryggingareftirlitið nýta høvi at kunna um ávís viðurskifti, ið leiðslur í tryggingarfeløgum og eftirlønargrunnum, grannskoðarar og ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingar eiga at vera varug við í 2026.

**1. Dagføring av tryggingarlógini**

Tann seinasta størri dagføringin av tryggingarlóggávuni varð framd í 2018, tá ið lógin varð broytt, og nýggjar kunngerðir um leiðslu, solvens, basiskapital, ársfrásagnir og tøkniligt grundarlag vórðu settar í gildi.

Nú er aftur tørvur á eini dagføring. Tryggingareftirlitið er tískil sambært avtalu við Tilfeingis- og vinnumálaráðið farið undir eina generella dagføring, har tann nýggja danska tryggingarlógin, sum kom í gildi tann 1. januar 2024, verður karmur um arbeiðið.

Eftirlitið er í byrjanini av arbeiðinum, har tað verður skapt eitt yvirlit yvir tær broytingar, sum eru framdar í Danmark. Við støði í hesum arbeiði, verður gjørd ein meting av, hvørjar broytingar eiga at verða framdar í tí føroysku lóggávuni.

Tryggingareftirlitið væntar at kunna feløgini nærri um arbeiðið í 2026.

**2. Yvirlit yvir tíðarfreistir og tilfar at lata Tryggingareftirlitinum í 2026**

Í viðfesta fylgiskjali eru settar upp tíðarfreistir fyri, nær tilfarið skal verða latið Tryggingareftirlitinum.

----o----

Tryggingareftirlitið takkar fyri gott samstarv í brátt farna ári og ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Gudmundur Effersøe Nónstein

# Yvirlit yvir tíðarfreistir og tilfar at lata Tryggingareftirlitinum í 2026

| **Tíðarfreistir:** | **Tilfar at lata Tryggingareftirlitinum:** | **Lógargrundarlag:** |
|---|---|---|
| 16. januar | Upplýsing um, nær **nevndarfundur** verður hildin, har **ársfrásøgnin** fyri 2025 verður **góðkend** | § 122, stk. 1 í tryggingarlógini |
| Ultimo januar | Yvirlit yvir nýtt endurtryggingarfeløg og teirra styrkismeting umframt fakultativar endurtryggingaravtalur fyri sertryggingar | § 5, stk. 3 í kunngerð nr. 1 frá 6. juni 2019 um endurtryggingarvirksemi og samtryggingarvirsemi |
| 1. februar | Fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** á TB oyðublað (hvønn ársfjórðing) | § 5, stk. 4 í kunngerð nr. 2 frá 27. juni 2018 um solvens og rakstrarætlanir hjá tryggingarfeløgum |
| 1. februar | Fráboðan um **skrásettar ognir og tryggingarligar avsetingar o.a.** á PP oyðublað (hvønn ársfjórðing) | § 8 í kunngerð nr. 1 frá 14. oktober 2009 um skráseting av ognum hjá tryggingarfeløgum |
| 2 dagar aftaná nevndar-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | **Ársfrásøgn, góðkend av nevndini**:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla | § 122, stk. 1 í tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná nevndar-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | **Grannskoðanarprotokoll** (pdf) | § 122, stk. 2 í tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná aðalfundin, har ársfrásøgnin er góðkend, tó í seinasta innan 1. mai | **Ársfrásøgn, góðkend av aðalfundinum**, undirskrivað av fundarstjóra, nevnd, stjórn og grannskoðara:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla (um broyting) | § 123, stk. 1 og 4 í tryggingarlógini |
| 2 dagar aftaná aðalfundin, har ársfrásøgnin er góð-kend, tó í seinasta innan 1. mai | **Ársfrásøgn fyri dótturfeløg**, ið ikki eru tryggingarfeløg | § 123, stk.3 í tryggingarlógini |
| 2 vikur aftaná, at nevndin hevur gjørt ORSA metingina, tó væntandi innan 1. mai | Fráboðan av ORSA | § 4, stk. 1 í kunngerð nr. 1 frá 27. juni 2018 um leiðslu og stýring av tryggingarfeløgum o.ø. |
| 1. mai | TB- fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. mai | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |
| 10 dagar aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar**: frágreiðing frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi,** latin nevndini í sambandi við, at nevndin góðkendi ársfrásøgnina | § 7, stk. 7 í kunngerð nr. 7 frá 15. desember 2008 um ábyrgdar-havandi tryggingarfrøðing. |
| 1 mánað aftaná aðal-fundin, har ársfrásøgnin er góðkend | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar:<br>Lata Tryggingareftirlitinum **árliga frágreiðingin frá ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingi** | § 8, stk. 2 í kunngerð nr. 7 frá 15. desember 2008 um ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðing. |
| 30. juni | Fyri lívstryggingarfeløg og eftirlønargrunnar:<br>Lata Tryggingareftirlitinum **samanskrivað tøkniligt grundarlag** | § 2, stk. 8 í kunngerð nr. 5 frá 27. juni 2018 um fráboðan av tøkniliga grundarlagnum o.a. fyri lívstryggingarvirksemi |
| 1. august | TB-fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. august | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |
| 30. september | **Hálvársfrásøgn** fyri hálvárið 1. januar - 30. juni:<br>• 1 teldutøkt eintak (pdf)<br>• 1 excel-fíla | §§ 2 og 145 í kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum |
| 1. november | TB-fráboðan um **solvens og individuellan solvenstørv** | - |
| 1. november | PP-fráboðan um **skrásettar ognir og avsetingar o.a.** | - |

**Ársroknskapir og hálvársroknskapir sum excelfílur**
Oyðubløð til árs- og hálvársfrásagnir kunnu takast niður sum excel fílur av heimasíðuni hjá eftirlitinum undir Fráboðanir: www.tryggingareftirlitid.fo

**Dagførd TB- og PP-oyðubløð**
Mint verður á at senda inn av nýggjum dagførd TB- og PP-oyðubløð fyri 4. ársfjórðing 2025, um fráboðaðu tølini 1. februar 2026 eru broytt í mun til ársfrásøgnina 2025. Dagførd oyðubløð skulu sendast Tryggingareftirlitinum í seinasta lagi samstundis sum tann grannskoðaða og góðkenda ársfrásøgnin verður latin eftirlitinum. Broytingarnar skulu vera merktar við reyðum.